# Jørgen Niclasen nýggjur formaður í Fólkaflokkinum

**Anfinn Kallsberg heldur at stundin er komin at lata yngri kreftir sleppa framat og hann fer at mæla Fólkaflokkinum til at velja Jørgen Niclasen til nýggjan formann**

ÆTTARLIÐSSKIFTI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gongur, sum Anfinn Kallsberg vil, verður tað Jørgen Niclasen, sum skal lyfta arvin eftir hann sum formann í Fólkaflokkinum*

Gongst sum Anfinn Kallsberg vil, verður tað Jørgen Niclasen, sum skal standa á odda fyri Fólkaflokkinum í Framtíðini.

Anfinn Kallsberg hevur verið formaður í Fólkaflokkinum í nógv ár.

Men tá ið hann leggur frá sær, fer hann at mæla flokkinum til at velja Jørgen Niclasen til nýggjan formann.

Tað hevur leingi verið greitt, at eitt ættarliðsskifti er á veg í fólkaflokkinum.

Av teimum sjey løgtingsmonnunum, eru teir fimm farnir um tey seksti um eitt ár og fleiri av teimum eru farnir at nærkast eftirlønaraldri.

Sjálvur fer formaðurin um tey seksti í heyst

-Tí er tað eisini greitt, at stundin er komin at seta rudda slóð fyri at einum nýggjum formanni í flokkinum at taka við eftir Anfinn Kallsberg.

Og tí hevur dúgliga verið gitt, hvørjir av teimum yngru politikarunum hava bestan møguleikan at taka við eftir Anfinn Kallsberg.

Tað hevur leingi ligið í luftini, at Anfinn Kallsberg ætlar at vísa á Jørgen Niclasen sum sín eftirmann.

## Yngri kreftir framat

Fyrsta almenna ábending um, at Anfinn Kallsberg hevur tilnevnt Jørgen Niclasen til krúnprins, fingu vit á landsfundinum í Fólkaflokkinum, tá ið Anfinn Kallsberg mælti flokkinum til at velja Jørgen Niclasen at standa á odda fyri valstríðnum upp undir næsta Løgtingsval, sum verður í seinasta lagi í januar.

Skal hetta takast sum tekin um, at tú ætlar seta Jørgen Niclasen í støðu til at taka við eftir teg?

Nú eri eg ikki einsamallur um at velja formann, tí tað ger ting- og landsstýrismanning í felag.

Og sjálvt um nógv ivast, tvíheldur hann um, at í hesum sambandi vigar hansara meining ikki meiri enn meiningin hjá nøkrum øðrum.

- Men tað er greitt, at vit mugu fara at hugsa um at lata yngri kreftir sleppa framat.

Anfinn Kallsberg sigur, at tá ið hann kom á ting á sinni, hevði Fólkaflokkurin yngstu tingmanning í miðal.

- Nú eru fimm av okkum antin farnir, ella eru við at fara um tey seksti og sostatt er stundin komin at fáa yngri fólk sleppa framat, bæði kvinnum og monnum.

Og skulu vit hugsa um aldurin, eru ikki nógvir møguleikar, skulu vit hava yngri kreftir framat.

Men heldur tú at Jørgen Niclasen hevði verið eitt gott boð upp á ein nýggjan formann?

- Hann er avgjørt eitt gott boð. Hann er ungur, men hevur kortini drúgvar royndir í politikki. Hann hugsar skjótt og hann er ikki skorin fyri tungubandið.

- Men eg havi bara eina atkvøðu, tá ið nýggjur formaður skal veljast, endurtekur hann.

Fer hon til Jørgen Niclasen?

Tað kanst tú meta um eftir tí, eg havi sagt, sigur Anfinn Kallsberg heldur hulisliga.

Men tað er neyvan til at misskilja!!

# Anfinn umhugsar at leita eftir hurðini

**Á aðalfundinun í Norðoya Fólkafloksfelag, boðaði Anfinn Kallsberg frá, at hann ivast í um hann stillar upp aftur á næsta løgtingsvali, tí hann heldur, at stundin er komin, at lata yngri kreftir sleppa framat**

ÆTTARLIÐSSKIFTI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein av okkara kendastu politkkarum Anfinn Kallsberg úr Fólkaflokkinum, umhugsar nú at taka seg úr politikki.

Tað staðfestir heimasíðan hjá Norðoya Fólkafloksfelag eftir aðalfund í felagnum nú ein dagin.

Á fundinum boðaði formaður Fólkafloksins frá, at hann heldur, at stundin er komin at lata ungri kreftir sleppa framat.

Og sjálvur hellir hann til at hann stillar ikki uppaftur, boðar Norðoya Fólkafloksfelag frá.

Anfinn Kallsberg vísir á, at av teimum sjey løgtingsmonnunum hjá Fólkaflokkinum, eru fimm av teimum við at fara um tey seksti, ella eru væl og virðiliga farnir um tey seksti.

- Tí haldi eg ikki, at vit, sum eru komin upp í árini, eiga at standa í vegin fyri at lata tey yngru sleppa framat, sigur hann.

Men hetta var ikki nakað, sum aðalfundurin í Norðoya Fólkafloksfelag tók undir við, tí fundurin mælti honum staðiliga til at umhugsa sína støðu einaferð enn, sigur Norðoya Fólkafloksfelag.

Sjálvur sigur Anfinn Kallsberg, at tað er á hvørjum vali, at hann umhugsar at stilla upp aftur.

- Men nú eri eg á veg um tey seksti, so nú haldi eg, at stundin er komin at eg finni hurðina.

Sjálvur vil hann kortini ikki siga um hann stillar upp aftur ella ikki.

-Tað er ein avgerð, sum ikki verður tikin, fyrrenn tað kemur har til, sigur hann.

# Til reiðar at taka stóra avbjóðing á sínar herðar

**- Eg kann ikki annað enn vera glaður fyri, at Anfinn Kallsberg vil hava meg til nýggjan formann í Fólkaflokkinum. Tað er ein stór avbjóðing, sum eg hevði verið til reiðar at taka á meg, sigur Jørgen Niclasen**

ÆTTARLIÐSSKIFTI

*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*- Eg kann ikki annað enn vera glaður fyri, at eg eri so høgt í metum hjá Anfinni Kallsberg, at hann vil hava meg til nýggjan formann í Fólkaflokkinum, sigur Jørgen Niclasen. Hann heldur eisini, at hann hevur nakrar av røttu eginleikunum, sum krevjast av einum floksformanni*

- Eg kann ikki annað enn vera glaður fyri, at eg eri so høgt í metum hjá Anfinni Kallsberg, at hann vil hava meg til nýggjan formann í Fólkaflokkinum.

Jørgen Niclasen sigur, at ferð tað einaferð at standa honum í boði at verða formaður í Fólkaflokkinum, hevði tað verið ein avbjóðing, sum hann hevði verið til reiðar at tikið á seg.

-Tað kemur einaferð hartil, at vit skulu hava nýggjan formann og tað vera altíð nógvar gitingar. Men hetta er ikki ein spurningur, sum er viðgjørdur í flokkinum.

Og Jørgen Niclasen sigur, at hetta er heldur ikki ein avgerð, sum hann á nakran hátt ætlar sær at provokera flokkin til at framskunda, tí eftir hansara tykki, hevur flokkurin ein serstakliga væl skikkaðan formann.

- Men skuldi tað komið hartil, at mær stóð í boði at verða formaður, hevði eg tikið av.

## Brýndur og brynjaður

- Tá ið eg kom upp í politikk, var eg fullur av ambitiónum og helt, at eg kláraði alt. Men eg kom skjótt í landsstýrið og tá fekk eg aðra bók at lesa í. Tað fyrsta hálva árið var so strævið, at eg næstan angraði, at eg var farin í holt við hetta so óroyndur sum eg var í politikki, tí ágangurin var so stórur, at eg varð næstan koyrdur í senk.

Men síðani heldur hann, at hann er bæði brýndur og brynjaður.

- Nú haldi eg, at eg havi nakrar eginleikar, eg haldi høvdu gagnað mær í einum starvi sum formaður fyri einum flokki.

- Í fyrsta lagi haldi eg, at eg havi royndirnar eftir skjótt 16 ár í politikki. Og so haldi eg eisini, at eg havi rætta aldurin.

-Sum formaður fyri Fólkaflokkinum á tingi, havi eg eisini havt ein savnandi og samansjóðandi leiklut og skal eg siga tað sjálvur, haldi eg ikki, at tað hevur gingið so galið, hóast onkur kinkur hevur verið í.

Her sipar hann helst til, at í nøkrum førum er komið alment fram, at tann eini tingmaðurin, Poul Michelsen, ikki hevur drigið somu línu, sum flokkurin annars.

-Tá ið vit hava verið í politiskum trupulleikum, havi eg altíð roynt at leita eftir loysnum, heldur enn at bara at halda fast.

Jørgen Niclasen heldur, at hetta eru alt viðurskifti, sum hann heldur, høvdu komið honum til góðar, skuldi eg fingið møguleikan at staði á odda fyri flokkinum, tí eg haldi, at hjá einum floksformanni er høvuðsuppgávan at samansjóða og savna flokkin, heldur enn at geva boð.

- Eg havi følt, at eg havi evni til at samansjóða flokkin og at finna semjur og tað haldi eg vera ómetaliga týdningarmikið.

Og so leggur hann afturat, at eru tað tveir politikarar, sum eru samdir, eru tað hann og Anfinn Kallsberg, bæði í vinnumálum, sjálvstýrismálum, búskaparmálum og sosialmálum.